# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/18 - 5. desember 2024 16:00-18:00

### Skrá:

1. Hoyringssvar til leiðreglur um upptøku í m.a. rásaskipan
2. Ymiskt
3. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

Møtt: Regin, Erla, Poula, Sjúrður & Derhard
Forfall: Bjørg, Súsanna, Snorri
Gestir: eingin

### Fundarfrágreiðing

Ad. 1
**Hoyringssvar til leiðreglur um upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar Kommunu – 21/00971-55**

*Skrivið viðfest sum fylgiskjal 1* er uppskot til leiðreglur, ið eru sendar skúlastýrinum til hoyringar.
*Skrivið viðfest sum fyrlgiskjal 2* er svarskriv til umsókn um at halda fram við verandi upptøkureglur og mannagongdir umframt fráboðan frá kommununi um, at hon tillagar leiðreglur fyri upptøku, so at næmingar ikki kunnu flyta í rásaskipan í 7.fl.

Skúlastýrið tekur undir við broyttu mannagongdini um flyting millum skúlar, ið vit meta er góð. Tað er eitt gott átak at leggja dent á, at skúlarnir skulu samskifta um næmingar, ið ikki hava trivist til næmingsins besta.

Skúlastýrið átalar, at upptøkan í rásir verður so avmarkað. Fyri Skúlan á Fløtum merkir nýggja leiðreglan, at næmingar als ikki kunnu flyta í Skúlan á Fløtum eftir 1. februar tað árið byrjað verður í 8.fl; tí øll hádeildin er skipað í rásir á Fløtum ítróttarrás og almannarás. Ikki ítróttarrás og rest, sum onkur kanska heldur.
Avmarkingin merkir millum annað, at næmingar, ið ikki trívast í øðrum skúla, ikki kunnu velja at flyta í Skulan á Fløtum í 8. og 9.fl, ið eru skipað í almannarás og ítróttarrás. Sama ger seg galdandi fyri Eysturskúlan, ið hevur Sciencerás og Almannarás.

Skúlastýrið harmast alvorliga um at nýggju leiðreglurnar koma at ávirka stóru royndarverkætlanina hjá Undirvísingstýrinum, Barna- og útbúgvingarmálaraðnum, Námi,

Námsvísindadeildini og Skúlanum á Fløtum, so at skúlaárini ikki kunnu samanberast orsakað av broyttum grundarlagi komandi ár.

Skúlastýrið vil eisini vísa á trupulleikan, ið hesar herdu leiðreglunar hava fyri næmingar, um teir velja at flyta í Skúlan á Fløtum í 8.fl. Hesir hava ikki møguleika at velja týskt, sum í Skúlanum á Fløtum byrjar í 7.fl., meðan royndarverkætlanin koyrir. Fyri hesar næmingar merkir tað, at teir ikki lúka upptøkukrøvini til hugbreyt á miðnámi.

Skúlastýrið ivast í, um tað er rætt, at næmingar ikki kunnu takast inn av bíðilista. Fyri at javnstilla skúlar, má tað so samstundis merkja, at næmingar heldur ikki kunnu taka eina tilmelding aftur. Hetta er ikki tilskilað í leiðreglunum.
Sum er taka vit bara næmingar inn av bíðilista, um ein annar hevur valt frásiga sær sítt pláss. Soleiðis er skipanin við bíðilista.
Leiðreglan avmarkar bara annan vegin, so sum hon er orðað.
Um vit ikki skulu nýta bíðilista má sama prinsipp sum er millum forskúla og barnagarð nýtast. Her missir næmingurin plássið, á stovni, um hann tekur av plássi í forskúla og kann ikki angra. Verandi orðing avmarkar bara annan vegin og ikki hin.

Skúlastýrið vil eisini fegið heita á leiðsluna í Tórshavnar Kommunu, um ikki at broyta fortreytirnar millum ár í royndarverkætlanin. So vit heita staðiliga á kommununa at um so er, at hesar leiðreglur skulu standa við, vilja vit, at tær ikki eru galdandi fyri Skúlan á Fløtum so leingi skúlin er partur av stóru royndarverkætlanini, ið fevnir um tvey ár afturat.

Ad. 2
**Ymiskt**
Upptøka komandi 1. fl.
Skúlastýrið er kunnað um at møgulig yvirtekning verður í komandi 1.fl.
Skúlastýrið ynskir, at vit halda okkum til barnatalið á 22. Men um hetta ikki letur seg gera, kann skúlastýið góðtaka eina hækking til 24 næmingar komandi 1.fl. Skúlastýrið góðtekur undir ongum umstøðum at 4 spor verða í Skúlaum á Fløtum. Tí eingi høli eru tøk til hetta. Hvørki stuttskygt ella langskygt.

Ad. 3
**Áseta næsta fund**
Komandi skúlastýrið er ikki fullmannað. Formaðurin kallar inn, tá kommunan hevur valt síni umboð.

Fylgiskjal 1

~~21/00971-54~~ 21/00971-55

**Leiðreglur fyri upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu**

**Heimildir og lógargrundarlag**
Sambært fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi. Kommunustýrið hevur skyldu at skipa fyri, at íbúgvarnir í kommununi hava møguleika at fáa undirvísing sambært § 26 í lógini, og at fígging er tøk til hetta.
Rætturin til skúlagongd í eini kommunu er tengdur at bústaðnum.

Tórshavnar kommuna er býtt upp í skúlaøki, mørkini verða lagað eftir tali á børnum, sum skulu í skúla, og mørkini kunnu tí flyta frá einum ári til tað næsta. Skúlaøkini verða løgd á torshavn.fo áðrenn innskriving, og tað verður heitt á foreldur, sum skulu skriva børn inn í forskúla og 1. flokk at kunna seg um, hvønn skúla teirra barn hoyrir til.

**Innskriving í forskúla og fyrsta flokk**
Roynt verður altíð at lata barnið sleppa í skúla so nær heiminum sum gjørligt. Men búgva stórir árgangir av børnum nærhendis einum ávísum skúla, kann verða neyðugt at flyta næmingar í annan skúla enn tann, sum er næstur heiminum.

Avgerð um pláss verður tikin við støði í hesum meginreglum:

Forskúli:
1. Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
2. Barnið hevur systkin í skúlanum
3. Barnið býr í grundupptøkuøkinum hjá skúlanum [1]

Fyrsti flokkur:
1. Barnið gongur í forskúla í skúlanum
2. Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
3. Barnið hevur systkin í skúlanum
4. Barnið býr í grunduuptøkuøkinum hjá skúlanum
5. Onnur serlig viðurskifti

**Flyta skúla í Tórshavnar kommunu**
Um ætlanin er at flyta næming úr einum skúla í Tórshavnar kommunu í ein annan skúla í kommununi, skulu foreldur venda sær beinleiðis til skúlan, sum ætlan er at søkja um pláss í

Fyrsti til og við 9. flokkur:
1. Næmingurin flytur í upptøkuøkið ella nærindis upptøkuøkinum hjá tí skúla søkt verður um pláss í
2. Næmingurin trívist ikki í skúlanum ella onnur serlig viðurskifti eru, sum gera at ein loysn kann vera at flyta skúla

Áðrenn støða verður tikin í sambandi við punkt 2, skal skúlin næmingurin gongur í verða tikin við upp á ráð, og samskifti skal vera millum skúlan næmingurin fer úr, og skúlan næmingurin fer í.

Rásir í 8. flokki:

[1] Skúlarnir hava grundupptøkuøki, mørkini á økjunum kunnu tí flyta frá einum ári til tað næsta, tí tey verða lagað eftir mettum talið á børnum í ymsu økjunum, ið skulu í forskúla og 1. Flokk, Grundupptøkuøkini verða løgd á torshavn.fo um heystið áðrenn innskriving.

1. Søkjast skal um pláss í tí skúla rásin er
2. Pláss í rásir skulu vera tillutað áðrenn 1. Februar, tað árið byrjað verður í 8. flokki. Eingin næmingur verður tikin inn á rás eftir tann dagin, heldur ikki av bíðilista.

**Flyta til Tórshavnar kommunu**
Foreldur at næmingum, ið flyta til Tórshavnar kommunu í einum skúlaári ella til skúlaársbyrjan, skulu søkja undir sjálvavgreiðslu á torshavn.fo

Tillutanin av næmingum til skúlarnar er við støði í ynskjunum hjá foreldrunum og út frá fylgjandi meginreglum:
1. um pláss ikki er í skúlanum í upptøkuøkinum, verður víst á pláss í øðrum skúla
2. atlit verður tikið at frástøðuni frá bústaðnum til skúlan, so skúlaleiðin ikki er óhøgliga long

**Næmingar búsitandi í øðrum kommunum**
Meginreglan er, at næmingar búsitandi í øðrum kommunum fáa ikki pláss í skúla í Tórshavnar kommunu.

Næmingar, sum flyta í aðra kommunu í einum skúlaári, kunnu halda fram í skúlanum í Tórshavnar kommunu tað, ið eftir er av skúlaárinum.

Um tøk pláss eru, kunnu næmingar úr øðrum kommunum tó verða skrivaðir inn í Nám X, sum er 10. flokstilboðið í Tórshavnar kommunu.

Nám X:
- næmingarnir verða skrivaðir inn á heimasíðunum hjá Eysturskúlanum
- foreldrini fáa boð frá skúlanum, um næmingurin fær pláss
- umsitingin hjá Tórshavnar kommunu fær boð um hesar næmingar frá skúlunum
- skúlagjald verður kravt fyri næmingarnar

**Gestanæmingar**
Víst verður til leiðreglur um gestanæmingar https://www.torshavn.fo/media/opzpfcu0/leiðreglur-fyri-upptøku-av-gestanæmingum-í-tórshavnar-kommunu.pdf J.nr 16/02458

**Næmingatal**
Sambært fólkaskúlalógini § 20 skal næmingatalið við skúlaársbyrjan vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokki.
Meginreglan í Tórshavnar kommunu er, at í mesta lagi 24 næmingar verða tiknir inn í hvønn flokk.

*Leiðreglur samtyktar í trivnaðarnevndini tann 15. november 2022*

---

[1]Skúlarnir hava grundupptøkuøki, mørkini á økjunum kunnu tí flyta frá einum ári til tað næsta, tí tey verða lagað eftir mettum talið á børnum í ymsu økjunum, ið skulu í forskúla og 1. Flokk, Grundupptøkuøkini verða løgd á torshavn.fo um heystið áðrenn innskriving.

Fylgiskjal 2

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest 28. november 2024

**Mentamáladeildin**

Skúlin á Fløtum
Att. Skúlastýrið
Hans Andriasargøta 10
100 Tórshavn

Okkara j.nr.
24/08756-4

Málsviðgeri
Jákup H. Foldbo

Tygara j.nr.
Teldupostur frá 25.10.24

**Viðvíkjandi: Skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum heitir á Mentamáladeildina um at fáa loyvi til serstaka mannagongd til upptøku til rásaskipan í 7. flokk.**

Leiðslan í kommununi hevur viðgjørt áheitanina frá skúlastýrinum um:

a. At mannagongdin fyri upptøku í hádeild, ið skúlin hevur nýtt, aftur verður heimilað
b. Um hetta ikki letur seg gera, at kommunan staðfestir at sama mannagongd, ið verður nýtt av øllum skúlum um flyting millum skúlar, so er galdandi.

Viðvíkjandi a.

Sagt verður frá at leiðslan heldur fast um avgerðina, ið var fráboðað 22.03.24, um at steðga innskriving í rásaskipanina á skúlanum á Fløtum í 7. flokk.

Leiðslan metir, at innskrivingin í 7. flokk er í stríð við býráðssamtykt frá 24.02.2022, punkt d.:

*d) at skúlarnir við framhaldsdeild kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúlum kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar skulu samstarva um rásir og tilboð.*

Legg til merkis, at í mun til framhaldsdeild og rásaskipan var talan um 8. og 9 flokk. Innskrivingin var til 8.flokk og ikki í 7. flokk.

Tað er rætt, at Skúlin á Fløtum hevur gjørt vart við síni sjónarmið og lýst sín ætlaða bygnað í sambandi við endurskoðan av skúlabygnaðinum fyri Tórshavnar kommunu í 2021. Tórshavnar kommuna hevur tó ikki fingið nakra formliga áheitan um og hevur ikki góðkent ein bygnað á Skúlanum á Fløtum, har innskrivað verður í hádeild í 7 flokk, heldur ikki í samband við royndarverkætlanina undir BUMR, fyri Skúlan á Fløtum 2023-2027.

At skúlin í mun til skúlabygnað er 4 sporaður frá og við 7. flokki, er við atliti at skúlin er móttøkuskúli fyri næmingar úr Velbastaðar skúla og merkir ikki, at skúlin hevur rætt til ella skal bjóða út tøk pláss til næmingar úr øðrum skúlum.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Postsmoga 32 • FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo
mánadag-hósdag kl. 9-16
fríggjadag kl. 9-15

Við hesi avgerð er ætlanin ikki at steðga framhald av møguligari upptøku av næmingum úr øðrum skúlum til rásaskipan í 8 flokk.

Viðvíkjandi b.

Í samband við at hildið verður fast við avgerðina, verða stig tikin til at dagføra leiðreglurnar fyri upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar, soleiðis at tær ikki kunnu nýtast sum ein umvegur til at flyta í rásir í 7. flokki.

Uppskot til leiðreglur hava verið til viðgerð í Trivnaðarnevndini og verða sendar skúlastjórum og skúlastýrum til hoyringar. Uppskotið verður síðani lagt fyri Trivnaðarnevndina fyri Jól.

Vinaliga
k.v.

Heini Gaard
deildarleiðari

Hermann Mortensen
trivnaðarstjóri